## UTTAN ÚR HEIMI

### Veðurstjórin frákoyrdur

Myndugleikarnir í Teilandi hava givið stjóranum á almennu veðurstovuni sekkin, tí hann boðaði ikki frá flóðalduni annan jóladag.

Thaksin Shinawatra, forsætisráðharri, hevur sagt, at Suparek Tansrivatnawong gjørdi eitt stórt mistak, tí tað er eingin ivi um, at vanlukkan hevði kravt munandi færri mannalív í Teilandi, hevði hann boðað myndugleikunum frá flóðalduni.

Dagin eftir flóðalduna segði tann nú frákoyrdi stjórin, at flóðaldan var tann fyrsta í Teilandi í meiri enn 300 ár, og at eingin av teimum 900 starvsfólkunum á veðurstovuni grunaði, at jarðskjálvtin í Indiska Havinum fór at elva til eina so ógvusliga flóðaldu. Ein annar fyrrverandi stjóri á veðurstovuni hevur harafturímóti sagt, at hann stúrdi fyri einari ógvusligari flóðaldu, tá hann frætti um tann harða skjálvtan. Hann royndi at boða veðurstovuni frá, men telefonin har svaraði ikki, tí tað var sunnudagur.

### Krevja trygd fyri olju

Lond í Asia, sum brúka nógva olju, vilja nú hava vissu fyri, at tey fáa ta oljuna, sum teimum tørvar.

Tey seinastu árini hevur búskaparvøksturin verið stórur í fleiri asiatiskum londum, og tað hevur havt við sær, at tey nýta munandi meiri olju nú enn fyri bara fáum árum síðani. Fyri umleið tíggju árum síðani fóru meiri enn 60 prosent av allari oljuni í Miðeystri til lond í Evropa og Norðuramerika, men í dag fara 67 prosent til lond í Asia. Tað eru serliga Kina, Japan og Suðurkorea, sum innflyta nógva olju.

Hesi londini vilja fegin hava vissu fyri, at tey fáa ta oljuna, sum tey skulu brúka, og tí verður ein fundur í dag ímillum tey asiatisku londini og tey týdningarmestu oljulondini í Miðeystri. Tað er India, sum hevur tikið stig til fundin, og hann er eisini har.

### Rættarmálið heldur fram

Hægstirættur í Kili hevur gjørt av, at rættarmálið ímóti fyrrverandi einaræðisharranum Augusto Pinochet skal halda fram.

Verjarnir hjá fyrrverandi forsetanum vildu hava rættin at steðga málinum, tí teir vilja vera við, at Pinochet er ov heilsuveikur. Tveir av teimum fimm dómarunum í hægstarætti góvu verjunum viðhald, men hinir tríggir atkvøddu fyri, at málið skal halda fram. Ákæruvaldið hevur ákært Pinochet fyri níggju burturflytingar og morð. Hann er eisini ákærdur fyri at hava givið serligum drápsmannaliðum boð um at beina fyri politiskum andstøðingum.

Í august samtykti kilska tjóðartingið at taka politiska órinið frá fyrrverandi forsetanum, so hann kundi koma fyri rættin, og stutt fyri jól varð hann formliga ákærdur.

### Ferðabøkur endurskoðast

Fyritøkan Lonely Planet, sum gevur ein hóp av ferðabókum út á hvørjum ári, hevur gjørt av at endurskoða sínar bøkur um londini við Indiska Havið.

Judy Slater, stjóri í Lonely Planet, sigur við Reuter, at í teimum endurskoðaðu útgávunum fer fyritøkan at ávara ferðafólk um, at jarðskjálvtar undir Indiska Havinum kunnu elva til ógvusligar flóðaldur. Fyritøkan hevur tikið lut í arbeiðinum at leita eftir horvnum ferðafólki í vanlukkuøkinum og hevur millum annað eina heimasíðu, har fólk kunnu gera vart við seg.

Lonely Planet hevur umleið 650 ferðabøkur og faldarar, sum verða prentaðar á 14 ymsum málum.



*Tann 23 ára gamli Rizal Sapura á trænum, áðrenn malaysiska skipið tók hann upp*

*Mynd: Reuters*

# Rak eina viku á havinum

**Tann 23 ára gamli indonesarin Rizal Sapura fór til havs við flóðalduni annan jóladag. Átta dagar seinni bleiv hann bjargaður**

FLÓÐALDAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mánadagin varnaðist ein av manningini á einum malaysiskum farmaskipi ein mann, sum stóð á einum træi 100 fjórðingar úti í Indiska Havinum. Tað vísti seg, at maðurin hevði sitið á trænum í átta samdøgur.

Tann 23 ára gamli Rizal Sapura, sum er úr indonesiska landspartinum Aceh, greiddi sínum bjargingarmonnum frá, at hann fór til havs við flóðalduni annan jóladag. Tað eydnaðist honum at fáa fatur á einum træi, sum flóðaldan hevði rykt upp við rót, og har hevði hann so sitið átta dagar og átta nætur. Til alla lukku vóru fleiri greinar á trænum, og tí hevði hann av og á ligið og hvílt seg.

Malaysiska farmaskipið, sum var á veg úr Suðurafrika til Malaysia, fór til lands við Rizal Sapura, sum alt fyri eitt varð fluttur á sjúkrahús. Hann var sum vera man útlúgvaður, men hevði tað eftir umstøðunum gott, sjálvt um hann ikki hevði fingið bitan í átta dagar.

Seinasta fríggjadag bleiv ein indonesisk kvinna funnin flótandi á einum træi úti í Indiska Havinum.

# Vilja hava Freivald frá

**Annarhvør svii heldur, at Laila Freivald, uttanríkisráðharri, sigur at leggja frá sær, tí hon hevur handfarið flóðalduvanlukkuna illa**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Bæði í Danmark, Noregi og Svøríki hava fólk verið misnøgd við myndugleikarnar í sambandi við flóðalduvanlukkuna í Suðurasia. Svøríki er tað landið, sum er meinast rakt, og tað er eisini har, at misnøgdin er størst.

Serliga Leila Freivald, uttanríkisráðharri, hevur staðið fyri skotum ta seinastu vikuna. Fjølmiðlarnir hava avdúkað, at hon var og hugdi at sjónleiki annað jólakvøld, sjálvt um svenska sendistovan í Teilandi hevði boðað henni frá vanlukkuni. Hon legði heldur ikki í at kunna Gøran Persson, forsætisráðharra um tað, sum hent var.

Ein kanning hjá stovn-inum Sifo í gjár vísti, at 49 prosent av teimum spurdu vilja hava uttanríkisráðharran at leggja frá sær. Men Leila Freivald sigur við Aftonbladet, at hon fer ikki frá.

Flestu sviar halda harafturímóti, at Gøran Persson, forsætisráðharri, hevur gjørt eitt gott arbeiði í sambandi við vanlukkuna. Tað siga í hvussu er 61 prosent av teimum spurdu.